

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 03 - 2013

# Atlantic Petroleum styrkir seg figgjarliga í Norra

Føroyska oljufelagið, Atlantic Petroleum er nú komið enn eitt týðandi stig víðari fram moti at gerast partur av leitingini á norska landgrunninum. Atlantic Petroleum boðar í dag frá, at norska dótturfelagið Atlantic Petroleum Norge AS hevur gjørt eina 3 ára lánsavtalu við Den Norske Bank uppá 300 mió. norskar krónur. Lánið er liður í vakstraræetlanini hjá Atlantic Petroleum samtakinum í norskum øki, og skal fíggja komandi leiti- og metingarvirksemi. Sambært avtaluni fíggjar Den Norske Bank umleið 74% av øllum leiti- og metingarkostnaði í norskum øki. Hetta økir munandi um fíggjarliga rásarúmið hjá Atlantic Petroleum fyri at vaksa um virksemið í Norra. Lánið verður endurgoldið av norska statinum, ið endurrindar oljufeløgum 78% av øllum leiti- og metingarkostnaði í norskum øki. Ben Arabo stjóri sigur, at hetta stigið er ein týðandi liður í ætlanum hjá Atlantic Petroleum í norskum øki. Atlantic Petroleum hevur sett sær fyri at vaksa um ognir felagsins og at byggja upp eina áhugaverda leitingarskrá í Norra. Tað var i fjør, at føroyska oljufelagið fekk fotin fastan a norska landgrunninum, eftir at felagið keypti upp norskt oljufelag. Felagið er við i seinasta leitiumfarinum i Norra, sum lat aftur 1. desember i fjør.